# Líkningarprosessin

upplegg til tjak

Toll- og Skattstova Føroya

Barbara á Tjaldrafløtti
cand. scient. adm.
mai. 1995

Líkningarprosessin

1 Nýggj skipan . . . . 3
1.1 Uppskot um nýggja skipan . . . . 3
1.2 Fyrimunir . . . . 3
1.3 Vansar . . . . 4
1.4 Endi . . . . 4

2. Formella skipanin . . . . 4
2.1 Skipanin sum hon er í dag . . . . 4
2.2 Avtalan millum Tórshavnar kommunu og líkningarráðið . . . . 6
2.3 Kærur og rættartrygd . . . . 7
2.4 Líkningarnevndin . . . . 8
2.5 Landsskattanevndin . . . . 9

3 Skipanin í verki . . . . 9
3.1 Hvør er Toll- og Skattstovan? . . . . 9
3.2 Álíkning og eftirlit í dag . . . . 10
3.3 Skipanin sæð frá ymsum sjónarmiðum . . . . 10
3.4 Niðurstøða . . . . 12

Ískoyti . . . . 13
Bygnaðurin í dag . . . . 13
Viðmerkingar til bygnaðin . . . . 14
Uppskot . . . . 14

# Líkningarprosessin

Toll- og Skattstova Føroya setti í januar 1995 í verk prosjekt um líkningarprosessina.

Prosjektið var sett í gongd, tí skipanin við álíkningini virkar ikki nóg væl og er ov stirvin, sæð í mun til tey krøv nútíðarsamfelagið setur, og tí broytingar í kommunustrukturinum eru fyri framman.

Endamálið við prosjektinum var at gera eitt uppskot til at betra um álíkningina sæð í mun til effektivitet og kvalitet og til at betra um rættartrygdina.

Arbeitt hevur verið við arbeiðssetninginum í 4 mánaðar og leggi eg her úrslitið fram sum eitt upplegg til tjak.

Byrjað verður við at seta fram uppskot í kapitul 1, síðani verður greitt frá, hvussu álíkningar- og kæruskipanin er bygd upp, og hvussu hon virkar.

Til síðst er eitt ískoyti, har sett verður fram uppskot um umskipan av líkningarráðnum og kærustovnunum innan skatt, toll og mvg.

## 1. Nýggj skipan

### 1.1. Uppskot um nýggja skipan

Toll- og Skattstova Føroya vil við hesum leggja niðanfyri standandi uppskot fram:

> **Skipanin við líkningarnevndum verður broytt soleiðis, at kommunalu líkningarnevndirnar/ bygdarráðini verða kærustovnur burturav**
>
> **Toll- og Skattstova Føroya skipar fyri allari skattaálíkning**
>
> **Landsskattanevndin verður styrkt umsitingarliga og fakliga**

### 1.2. Fyrimunir

Fyrimunirnir verða, at:

Rættartrygdin verður styrkt, og effektiviteturin og kvaliteturin verða betur,

* tí lógarverkið verður til at arbeiða eftir,

* tí Toll- og Skattstovan kann planleggja, hvussu álíkningin skal fara fram, og

* tí starvsfólkið hevur ein fakligan førleika, sum tryggjar, at álíkningin fer fram eftir galdandi lógum.

### 1.3. Vansar

Vansarnir kundu verið, at staðkunnleikin verður mistur, og inntøkur, sum kommunan kundi givið upp, ikki verða givnar upp, men sera fáar broytingar verða gjørdar og tí er ringt at peika á konkretar vansar.

### 1.4. Endi

Út frá tí kunnleika og tí samarbeiði Toll- og Skattstova Føroya hevur við landsins kommunur, væntar Toll- og Skattstovan, at hetta uppskot í allar flestu kommunum fer at verða væl móttikið.

Mett hevur verið, at tað var hóskandi at fara undir hetta prosjekt nú broyting av kommunustrukturinum er fyri framman.

## 2. Formella skipanin

### 2.1. Skipanin, sum hon er í dag

Skipanin er í dag bygd á tann hátt, at: "Bygda(r)ráðini skipa fyri skattaálíkningini í kommununi, men kunnu eisini viðtaka at velja eina líkningarnevnd, sum sjálvstøðug tekur sær av skattingini". (SL kap.7, § 84).

Í teim smáu kommununum er tað so, at bygdaráðini skipa skattaálíkningina, meðan tær størru kommunurnar hava valt líkningarnevndir.

Tað vil siga, at 50 bygdarráð/líkningarnevndir (í hvørjari eru 3-7 limir) skipa fyri skattaálíkningini.

Men møguleiki er fyri at gera avtalu við Toll- og Skattstovuna um, at líkningarnevndirnar í størri ella minni mun lata Toll- og Skattstovuna gera álíkningina teirra vegna. (SL § 86, stk. 2)

Til at samskipa arbeiði millum líkningarnevndir og skattafyrisiting hevur landsstýrið gjørt kunngerð um starvsskipan fyri líkningarnevndir og skattafyrisitingar. Í § 11 stendur, at økisfyrisitingarnar taka sær av øllum fyrisitingararbeiði í samband við ta skattaálíkning, sum líkningarnevndirnar skulu skipa fyri sambært kap. 7 í samtíðarskattalógini. Økisstjórin, ella vegna hann annað starvsfólk frá økinum, er skrivari hjá nevndini og tekur ímóti øllum brøvum til nevndina, eins og hann hevur ábyrgdina av øllum málum, sum økið fyrireikar til nevndina.

Hetta merkir at arbeiðsuppgávan og sambandið millum bygdarráðini/líkningarnevndirnar (hereftir nevnt nevndin) og Toll- og Skattstovuna er sera nær tengt hvørt at øðrum.

Víðari stendur, at økisstjórin hevur ábyrgdina av at seta upp øll skjøl, sum nevndin letur frá sær. Hann er við á fundunum, tó uttan atkvøðurætt, og førir gerðabókina.

Økini hava somuleiðis skyldu til:

* at fyrireika alla álíkningina hjá kommununum til líkningarnevndirnar at taka støðu til og seta upp tey skjøl, sum hesi vøld lata frá sær (§85 í SL)

* at vera kommununum til hjálpar við metingum um inntøkugrundarlagið, tá ið kommunuskattaprosent skulu ásetast í samband við, at fíggjarætlan verður gjørd osfr.(§12, stk. 2 í kunngerð um starvsskipan..)

* at lata starvsfólk fara út á fund við kommunurnar, tá ið hesar senda áheitan um tað. (§ 12, stk. 3 í kunngerð um starvsskipan..)

Sambært omanfyrinevndu skyldum ið Toll- og Skattstovan hevur yvir fyri kommununum, sæst, at kommandolinjurnar ganga frá nevndunum til økini.

Víðari merkir hetta, at tá starvsfólkið á Toll- og Skattstovuni eru tey, sum hava ta fakligu vitanina, eru tað í veruleikanum tey, sum koma at taka avgerðirnar. Tí sum kunnugt, eru nevndirnar skipaðar eftir "leikmansprinsippinum", og tað merkir, at limirnir í nevndunum eru ikki fakfólk; tó eru undantøk.

Sera ymiskt er, hvussu tær 50 nevndirnar virka, hvussu tær eru samansettar, hvønn áhuga tær hava í líkningararbeiðinum, hvussu ofta fundir verða hildnir, og hvussu mannagongdin ella avtalan er millum nevnd og Toll- og Skattstovuna osfr.

Hetta merkir, at ójavnt er, hvussu Toll- og Skattstovan merkir leiklutin hjá nevndunum í gerandisdegnum.

Sum vit fyrr hava sæð, vóru dømi um, at kommandolinjurnar gingu frá nevndunum til Toll- og Skattstovuna, men við at hyggja í § 93 í SL, ber tó til at siga, at kommandolinjurnar ikki bert ganga annan vegin. Í § 93 í SL stendur, at líkningarráðið hevur heimild til at geva teimum kommunalu líkningarvaldunum rættleiðingar líkningini viðvíkjandi, og eru tey skyldug at fylgja hesum rættleiðingum. Somuleiðis kann líkningarráðið - bæði meðan líknað verður,

og seinni - áleggja líkningarvaldunum í kommununum at líkna skattin uppaftur fyri einstakar skattgjaldarar ella allar.

Sum kunnugt, er líkningarráðið ovasti myndugleiki í skattaálíkningini, og verður tað Toll- og Skattstovan, sum kemur at geva nevndunum rættleiðing viðvíkjandi líkningini o.s.fr. - Nú ganga kommandolinjurnar brádliga báðir vegir. Hetta ger støðuna ikki minni fløkjasliga.

Fyri at undirstrika fløkjuna, stendur í § 86, stk 3 í SL, at líkningarnevndin vegna kæru ella nærri kanning av skattsetingini, kann taka alla álíkningina uppaftur til nærri viðgerðar.

Tað vil siga, at:

* kommunan tekur sær av skattingini, sambært lóg (SL §84)
* T&S tekur sær av skattingini, fakliga og praktiskt
* T&S hevur skyldu at fylgja boðum frá kommununum, fakligar og praktiskar mannagongdir (SL §85)
* kommunurnar hava skyldu at fylgja rættleiðingum frá T&S tvs. líkningarráðnum, td. um álíkning (SL §93)
* kommunurnar hava skyldu til at taka alla álíkningina uppaftur (SL §93)

Sambært vanligari organisatiónsteori og tí hierarkiska bygnaðinum ganga kommandolonjurnar frá einum parti til hin partin. Hetta fyri at kunna plasera ábyrgd, røkka effektiviteti og tryggja kvalitet.

Sum víst, er bygnaðurin í føroyskari skattaálíkning ikki hierakiskur, og hetta kann vera ein av orsøkunum til, at ringt er at plasera ábyrgd og at fáa effektivitet og kvalitet skipaðan.

## 2.2. Avtalan millum Tórshavnar kommunu og líkningarráðið

Í § 11, stk. 4 í kunngerðini stendur, at har kommunur hava skipað serliga kommunala skattafyrisiting, skal avtala gerast millum kommunalu fyrisitingina og Toll- og Skattstovuna um samstarv og býti av uppgávu millum kommunalu fyrisitingina og T&S.

Tað er bert Tórshavnar kommuna, sum hevur skipað seg við serligari skattafyrisiting við 2 fólkum. Samstarvsavtala er gjørd millum Toll- og Skattstovuna og Tórshavnar Býráð.

Fyri at lýsa hetta samstarvið eitt sindur, vil eg her greiða frá avtaluni millum Tórshavnar Býráð og Toll- og Skattstovuna.

Sambært skattalógini § 100, 3. stk. skal sjálvuppgávan latast líkningarráðnum, t.e Toll- og Skattstovan. Hetta merkir, at sjálvuppgávan og tilhoyrandi ognaruppgerðin verður goymd á Toll- og Skattstovuni. So skjótt Toll- og Skattstovan hevur skrásett og gjøgnumgingið sjálvuppgávuna, fer álíkningin í gongd. Sum nevnt frammanundan, hevur nevndin álíkningina um hendi og skal tískil hava skjølini frá Toll- og Skattstovuni. Tvs. at skjøl verða latin líkningarnevndini at álíknast og aftur til Toll- og Skattstovuna har broytingar verða gjørdar, og har sjálvuppgávan verður arkiverað.

Sambært § 93 í SL hevur líkningarráðið eftirlit við skattaálíkningini í kommununum og ansar eftir, at hon er farin fram á rættan og samlíkan hátt og í samsvari við skattalógina og vegleiðingar og ásetingar frá Toll- og Skattstovuni, Stýrinum og Líkningarráði Føroya.

Í samstarvsavtaluni millum Toll- og Skattstovuna og Tórshavnar Býráð stendur, at partarnir eru samdir um, at tað framvegis er nevndin, ið hevur ábyrgd av líkningini, og sum skal skipa/standa fyri álíkningini (herundir eftirlíkningini) í kommununi.

Tvs. at sambært § 93 í SL hevur líkningarráðið *eftirlit við skattaálíkningini*, og sambært samstarvsavtaluni skal nevndin standa fyri álíkningini og *eftirlíkningini*.

Orðið eftirlíkning er ikki at finna í skattalógini og heldur ikki í kunngerðini um samstarvsskipan millum líkningarnevndir og skattaøkisfyrisitingar. Ilt verður tí konkret at siga, hvat eftirlíkning er, nær hon byrjar, og nær hon endar, og hvør munurin er millum eftirlit við skattaálíkning og eftirlíkning.

Tí má niðurstøðan verða, at so leingi eingin konkret definitión er á hesum fyribrigdum, verður altíð ivamál um, hvat er hvat. Hetta verður sagt, tí talan er um tveir stovnar, sum umsita sama mál. Var talan um ein stovn, var tað ikki á sama hátt neyðugt at skilja millum eftirlit og eftirlíkning, tí tá var bæði tilfar og starvsfólk á sama staði.

Men í § 2 í samstarvsavtaluni verður tað endaliga staðfest, at heimildin til at gera eftirlit bæði er hjá Toll- og Skattstovuni og hjá kommununi. Í somu grein stendur, at arbeiðið hjá kommunalu umsitingini serliga fevnir um líkning/*grannskoðan* av roknskapum o.t.

Hetta ber í sær, at ikki verður gjørligt at skipa líkningina effektivt og nýta arbeiðsmegina nóg væl, tá báðir stovnar hava somu uppgávu.

Í dagliga virkseminum er henda skipan ein stórur trupulleiki.

## 2.3. Kærur og rættartrygd

Sambært § 87 í SL er kommunala líkningarvaldið kærustovnur. Kærur um álíkningina, sum skattafyrisitingin hevur gjørt vegna kommununa, skulu sendast kommunala líkningarvaldinum, áðrenn 4 vikur eru farnar, frá tí skattgjaldari hevur fingið boð um álíkningina, sum kært verður um.

Sum nevnt frammanfyri eru 50 kommunalar kærunevndir við 3-7 limum í hvørjari. Spurnartekin kann her setast við, hvørja trygd skattaborgarin hevur, fyri at hansara skattamál verður viðgjørt á rættan og samlíkan hátt, og at goldið verður tað, borgarin eigur at gjalda, hvørki meira ella minni.

Við øðrum orðum kann ein her spyrja um, hvussu rættartrygdin hjá borgaranum er?

Eg vil her í stuttum greiða eitt sindur frá hvat skilst við rættartrygd.

Kjarnin í rættartrygdini er kravið um respekt fyri integriteti (einleiki/falsloysi) hjá tí einstaka.

Við rættartrygd meinast vanliga, ein røð av fyriskipanum, sum eru gjørdar fyri at verja móti yvirgangi og órættvísi frá almennum myndugleikum og frá øðrum borgarum.

Í hesum førum er tað tann almenni myndugleikin sum er áhugaverdur. Almenni myndugleikin er líkningarnevndirnar og landsskattanevndin, sum aftur er vanligi borgarin.
Tosað verður um:

- formella rættartrygd, t.e., processuellar og organisatoriskar fortreytir, sum skulu verða til staðar fyri at tryggja kravið um korrekta og trygga málsviðgerð, tvs. tosað verður um eitt apparat ella eina fyrisiting.

- materiella rættartrygd, t.e. endamálið við materiellum røttum, lættskiljandi og forútsigiligum avgerðum. Tvs. at í fyrisitingini eru konkretar mannagongdir at arbeiða eftir, soleiðis at úrslitið av avgerðum ikki verður tilvildarligt.

## 2.4 Líkningarnevndin

Hyggja vit eftir líkningarnevndini sum kærustovn, Tórshavnar líkningarnevnd undantikin, ber til at siga, at prosessuellar og organisatoriskar treytir eru ikki til staðar. Eindirnar eru so smáar, at ikki ber til at tosa um nakrar fastar prosessir ella mannagongdir, ei heldur um nakran sjálvstøðugan stovn. Tvs. formella rættartrygdin er ikki í lagi.

Tá kærustovnurin ikki hevur nakra fyrisiting, kann hann heldur ikki liva upp til kravið um endamálið við materiellum rættum og lættskiljandi og forútsigiligum avgerðum, og tí kann ein siga, at rættartrygdin er ikki í lagi.

Hugsast skal í hesum føri um, at av tí at kærustovnarnir eru so nógvir í tali í mun til borgararnar, fær hvør stovnur fáar kærur, og kravið um fyrisiting og fakligan førleika kann tí ikki gangast á møti.

Tess meira ella harðari landsmyndugleikarnir leggja uppí, tess størri eigur kravið um rættartrygd at verða.

Generelt kann ein siga, at tá tosað verður um álíkning og kærur, er ringt at peika á nøkur

krøv, sum sett eru nevndunum, um rættartrygd.

Sum nevnt, hevur Tórshavnar líkningarnevnd eina fyrisiting, nevniliga líkningardeildin har 2 starvsfólk starvast. Út frá kriteriunum um rættartrygd, sum nevnd eru omanfyri, kann ein tí siga, at rættartrygdin hjá borgarum í Tórshavnar kommunu, verður betri røkt, enn rættartrygdin hjá øðrum borgarum í Føroyum.

### 2.5. Landsskattanevndin

Góðtekur skattaborgarin ikki avgerðina hjá kommunala kærustovninum, kann kærast til landsskattanevndina, men skal skattaborgarin altíð kæra til kommunala kærustovnin fyrst.

Í landsskattanevndini sita 5 løgtingsvaldir limir, og nevndin hevur skrivara, sum skal vera lógar- og roknskaparkønur. Tá kæra kemur til landsskattanevndina, biður landsskattanevndin líkningarráðið um ummæli av málinum, soleiðis at meira tilfar er at taka støðu út frá.

Praksis er, at lógardeildin í Stýrinum ger ummæli til landsskattanevndina vegna líkningarráðið. Ummælið verður gjørt út frá teimum upplýsingum, sum koma frá fyrisitingini á økinum.

Hyggja vit eftir kærustovnunum út frá einum rættartrygdarsjónarmiði, so er munurin ímillum landsskattanevndina og kommunala kærustovnin tann, at krøv verða sett til landsskattanevndina um, at skrivari, sum hevur fakligan førleika, skal vera tilknýttur nevndini.

Her kann sporast ein ávís trygd. Taka vit síðan hædd fyri at líkningarnevndirnar eru 50 í tali í mun til eina landsskattanevnd, so kann sigast at munandi færri møguleikar verða fyri ógegni ella inhabiliteti.

Men eins og kommunurnar, Tórshavnar kommuna undantikin, hevur landsskattanevndin ikki nakra fyrisiting sum gevur prosessuellar og organisatoriskar fortreytir, sum so kann tryggja borgaranum eina korrekta og trygga málsviðgerð.

## 3. Skipanin í verki

### 3.1. Hvør er Toll- og Skattstovan?

Toll- og Skattstovan er fyrisiting hjá kommununum og fyrisiting hjá líkningarráðnum. Hetta merkir, at tá tað snýr seg um líkning, hevur Toll- og Skattstovan tveir ymsar leiklutir.

Í gerandisdegnum merkir tað, at tá T&S t.d. fyrireikar eitt mál fyri nevndina og kemur við

tilmæli til broytingar til álíkningina, skal broytingin gerast á pappír hjá kommununi, og økisstjórin, ella annar í hansara stað, kann skriva undir vegna kommununa. Tað skal tá týðuliga verða tilskilað í brævinum, at tað er T&S sum skrivar undir *fyri* kommununa. Á brævinum skal verða tilskilað, at kærast kann til kommunala líkningarvaldið.

Tá T&S vegna líkningarráðið ger broytingar í skattaálíkningini, verður skrivað á egið pappír og skrivað verður, at kærast kann til landsskattanevndina.

Í veruleikanum er tað starvsfólk á T&S, sum í flestu førum finna fram til tær broytingar, sum skulu gerast, og fremja broytingarnar. Heilt, heilt fáar broytingar koma frá líkningarnevndunum.

Umráðandi er hjá starvsfólkunum her at vita, hvønn leiklut ein hevur, um tað er sum fyrisiting fyri kommununa ella fyri líkningarráðið.

Henda skipanin er torfør hjá borgaranum at skilja.

## 3.2. Álíkning og eftirlit í dag

Toll- og Skattstovan hevur skipað arbeiðið á stovninum eftir nútíðar arbeiðshættum, og amboð sum stýring, planlegging, menning og edv verða nýtt til at fáa effektivitet, kvalitet og professionalismu so gott sum til ber.

Galdandi skipan við líkningarnevndum sum álíkningarmyndugleiki forðar fyri, at tann planlegging, sum Toll- og Skattstovan t.d. hevur lagt fyri løntakaraálíkningina, kann fremjast í verki.

Til tess at skipa arbeiðið effektivari og fyri at órógva borgaran minst møguligt hevur Toll- og Skattstovan skipað virksemi viðvíkjandi revisión av roknskapum sum samskipað eftirlit. Hetta merkir, at eftirlitið umfatar bæði skatta-, mvg- og tolleftirlit.

Toll- og Skattstovan ger á hvørjum árið skipan fyri, hvørji virkir skulu kannast. Møguleiki verður soleiðis fyri (hugsað verður her serliga um Tórshavnar kommunu), at eitt virki verður kannað, hvat skatti viðvíkur, og sama virki kann í sama ári verða kannað av samskipaða eftirlitinum. Ella nøkur virkir í kommununi verða kannað av samskipaða eftirlitinum, meðan onnur bert verða kannaði fyri skattaálíkningina. Munur verður soleiðis á viðferðini ella eftirlitinum hjá borgarum í somu kommunu.

## 3.3. Skipanin sæð frá ymsum sjónarmiðum

Eitt av endamálunum við nevndunum, tvs. tí fólkaliga elementinum er at líkningarnevndirnar kunnu koma við inntøkum, sum borgarin ikki hevur givið upp á sjálvuppgávuni, eins og nevndirnar skulu meta um inntøkuna hjá borgarum og virkjum, sum ikki hava latið inn

sjálvuppgávu og/ella roknskap. Sum nevnt omanfyri koma sera fáar broytingar ella upplýsingar frá líkningarnevndunum.

Líkningarnevndunum er ikki heimilað atgongd til ognaruppgerðina, tá líknað verður, og tí er ringt at gera eina fullfíggjaða álíkning. Hetta er ein grundleggjandi avmarking ella forðing.

Umframt hesa forðing eru aðrar.

Sæð út frá einum *rættartrygdarsjónarmiði* merkir skipanin í verki tað, at rættartrygdin er gjørd sera veik. Hetta tí nøkrum borgarum verður víst størri fyrilit enn øðrum, og tí verður ikki greitt, hvørjar fyrisitingarreglurnar eru.

Øvugt kann hugsast, at summar líkningarnevndir vilja vísa tí almenna meira fyrilit - hugsað verður her um áhuga fyri provenuinum. Møguleikin hjá borgaranum fyri at røkka tí, sum hann heldur vera rætt, verður tá minni, og harvið er rættarstøðan hjá borgaranum vikna.

Sæð út frá einum *sosiologiskum* sjónarmiði verður staðfest, at skipanin er sera torfør at umsita. Tað, sum kravt verður av nevndarlimunum er, at limirnir geva upp tað, teir vita um teirra medborgarar. Hetta førir við sær, at nevndarlimirnir skjótt kunnu verða illa sæddir av teirra medborgarum, og gerandisdagurin kann gerast trupul, tí ikki er liviligt at búgva í einari bygd, tá man sum nevndarlimur ikki verður væl sæddur av bygdarfólkinum.

Sæð út frá einum *habilitets* sjónarmiði er skipanin eisini óheppin, tí hóast limir ikki eru beinleiðis í ætt við ein møguligan borgara, so er tað oftast so, at eini ella onnur viðurskifti gera, at persónarnir kennast, og møguligar interessukonfliktir uppstanda.

Sæð út frá tí *fakliga* sjónarmiðinum, er tað sera ymiskt, hvussu nevndirnar eru samansettar, men hugsa vit um Tórshavnar kommunu, hevur líkningarnevndin eina fyrisiting við 2 starvsfólkum, sum røkja álíkningaruppgávuna. Hetta hevur ongin onnur kommuna í landinum, og tí kann sigast, at viðgerðin av borgarunum verður ikki eins.

Hjá teim størru kommununum hevur tað víst seg, at líkningarnevndirnar eru tær, sum ringast eru at manna, so hóast kommunan kundi hugsa sær at valt limir í nevndina við ávísum fakkunnleika, hevur tað víst seg at verið torført.

Í flestu førum er tað T&S sum ger álíkningina vegna kommununa. Tað vil siga at T&S verður stovnurin sum "leggur linjuna".

Undantikin er tó Tórshavnar kommuna, sum hevur egna fyrisiting.

Sum víst hevur álíkningar- og kæruskipanin fleiri vansar og gerst sera torfør at umsita.

Hóskandi kann her verða spurt: "Hvørjar fyrimunir hevur skipanin?" Til tann spurningin kann svarast: "Skipanin hevur ongar fyrimunir". Ein fyrimunir kundi verið, at líkningarnevndin kom við upplýsingum til sjálvuppgávuna. Men, sum víst omanfyri, har peikað verður á ta sosiologiska aspekti, kann hendan skipan ikki fáast til at virka.

### 3.4. Niðurstøða

Skipanin við líkningarnevndum hevur nógv ár á baki, og endamálið við skipanini var, at sóknarstýrið setti borgararnar í skatt, alt eftir hvat teir høvdu av inntøku av jørð, fiski og eftir, hvat teir annars vóru førir fyri at gjalda. Tvs. útangsstøðið í skattaálíkningini verður tikið í staðkunnleikanum.

Endamálið við nevndunum var eisini, at tær skuldu tryggja borgaran ímóti embætisvaldinum, og soleiðis gjørdust líkningarnevndirnar kærumyndugleiki.

Í dag fara skattaupplýsingar- og skattaútrokningar um EDV-skipanina.

Í takt við útviklingina av samfelagnum eru lógirnar og skattaskipanin vorðin alt meira útbygd, og til tess at umsita lógarverkið er neyðugt við fakliga útbúnum fólki. Líkningarnevndirnar standa ikki av skattafakligum limum, og tí liggur ein sjálvskrivað avmarking í hesum.

Tíðirnar eru vorðnar øðrvísi bæði hjá borgaranum og í samfelagnum sum heild, og tíðin er tí eisini komin til eina øðrvísi álíkningar- og kæruskipan.

## Ískoyti

Mett hevur somuleiðis verið, at tað er hóskandi her at greiða frá bygnaðinum hjá landsfyrisitingini viðvíkjandi skatti, tolli og mvg í sambandi við at lagt verður fram uppskot um álíkningarreform.

### Bygnaðurin í dag

Líkningarráð Føroya er ovasti myndugleiki í skattaálíkningini. Líkningarráðið er skipað av 3 limum og 3 varamonnum, sum landsstýrið tilnevnir fyri 4 ár. Ein av ráðslimunum skal vera roknskaparkønur, annar lógarkønur og triði fastognar- og byggikønur. Somu reglur, sum eru galdandi um, hvør hevur skyldu at taka við skipan í bygda(r)ráði og líkningarnevnd, eru galdandi fyri limir líkningarráðsins.

Tað vil siga, at kompetancan, sum í øðrum førum er hjá Føroya Landsstýrið, her er útdelegerað til Líkningarráð Føroya, og er Toll- og Skattstovan umsitingin hjá líkningarráðnum.

Høvuðsuppgávan hjá Toll- og Skattstova Føroya er at umsita inntøkuskattalóggávuna, toll- og avgjaldslóggávuna og mvglóggávuna, men tilsvarandi "ráð" eru ikki fyriskipað í toll- og avgjaldsmálum og mvg-málum.

Tá tosað verður um kærur, er tað viðvíkjandi skatti soleiðis, at kommunali kærumyndugleikin er 1. kærustovnur, og landsskattanevndin 2. kærustovnur. Í 1. kærustovni velur bygda(r)ráðið 3-7 limir ímillum tey, sum eru valbær til bygda(r)ráðið. Til 2. kærustovn velja tinglimir 5 limir í landsskattanevndina.

Viðvíkjandi mvg er tað soleiðis, at mvg-nevndin er 1. kærustovnur. Landsstýrið setur nevndina, ið er mannað við 3 limum, sum hava ein fjølbroyttan kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti. Minst ein av limunum skal vera løgfrøðingur.

Viðvíkjandi tolli- og avgjøldum er tað soleiðis, at tollnevndin er 1. kærustovnur. Landsstýrið setur nevndina, ið er mannað við 3 limum, sum hava ein fjølbroyttan kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti. Minst ein av limunum skal vera løgfrøðingur.

Vert er her at leggja til merkis, at felagsnevnarin til allar 4 kærumyndugleikarnar er, at vanligi borgarin kann manna nevndina, tvs. dentur verður lagdur á tað fólkaliga elementi. Tó er tað eitt krav frá landsstýrinum, at nevndirnar hava ein ávísan fakligan førleika. Tollkærunevndin og mvg nevndin skulu verða umboðaðar við fólki, sum hava fjøllbroyttan kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti og løgfrøðingur skal vera í nevndini.

Tó eru ongi krøv um fakligan førleika sett kærumyndugleikunum í skatti, uttan tað at skrivarin skal verða lógar- og roknskaparkønur. Hetta kann tykjast løgið, tá hugsað verður um, at skattaviðurskifti fevna um eitt sera stórt lógarøki.

Eisini er vert at býta merki í, at mvg-nevndin og tollnevndin ikki er sama nevnd, hóast krøvini ið sett verða nevndunum eru tey somu, men at líkningarráðið og mvg-nevndin eru mannað av somu limum. Her kann leggjast aftrat, at líkningarráðið, Toll- og Skattstovan, rindar mvg-nevndini samsýning fyri nevndararbeiðið.

## Viðmerkingar til bygnaðin

Lóg um "Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om oprettelse af et Ligningsråd m.v.", var lýst í kunngerðarsavni nr. 69 fyri 1941, og síðani tá eru ikki stórvegis broytingar gjørdar.

1. august 1992 vóru Líkningarráð Føroya og Føroya Tollstova løgd saman í ein stovn til Toll- og Skattstova Føroya. Gjørdur var ein nýggjur bygnaður, sum tó ikki fevndi um líkningarráðið.

1. januar 1993, var lóg um meirvirðisgjald sett í gildi og var í hesum sambandi avgjørt, at mvg-nevndin skuldi verða sama nevnd, sum líkningarráðið.

Hetta virkar heilt øvugt, og er her ongin natúrligur samanhangur. Krøvini til nevndirnar eru ymisk, annar stovnurin er kærumyndugleiki, meðan hin er ovasti skattamyndugleiki.

## Uppskot

Fyri at fáa ein betri samanhang í ráð og kærumyndugleikar, veður skotið upp, at Líkningarráðið verður broytt til Toll- og Skattaráðið og er, umframt at vera ovasti álíkningarmyndugleiki, ovasti myndugleiki viðvíkjandi meirvirðisgjaldi, tolli og øðrum avgjøldum.

Mælt verður til at í ráðnum verða 5 limir.

Skotið verður eisini upp, at mvg-nevndin, landsskattanevndin og toll-nevndin, og møguliga eisini aðrir kærustovnar, hava sjálvstøðuga felags umsiting, sum er mannað við einum ella tveimum starvsfólkum.

Skotið verður eisini upp, at felagsfyrisitingin tekur avgjald fyri hvørja kæru. Vinnur kærarin málið, fær hann peningin aftur, tapir kærarin málið, fær hann ikki peningin aftur.